## Partaeigararnir í Smyril Line samdir

Partaeigararnir í P/F Smyril Line hava gjørt semju um ferðaætlanina hjá Norrønu fyri komandi árið. Tað merkir, at ósemjan við hetlendingar er loyst, og at tey rættarmál, ið hava verið upp á tal, verða av ongum.

Ein partur av semjuni er, at partaeigararnir í felag hava lagt eina nýggja og spennandi ferðaætlan, har Skotland kemur inn sum nýtt ferðamál, og Hetland verður varðveitt sum ferðamál. Ein annar partur av semjuni er, at hetlendski partaeigarin, Shetland Development Trust, setur meira pening í Smyril Line.

Høvuðstættirnir í nýggju ferðaætlanini eru, at næsta ár siglir Norrøna uml. 25 ferðir upp á Hetland móti uml. 70 ferðum í ár.

- Nú kenna vit karmarnar, ið eru at arbeiða undir hetta komandi árið, og tað ber vónandi í sær, at vit fáa arbeiðsfrið, sigur Thomas Mgnussen, stjóri. Hann leggur afturat, at Smyril Line arbeiðir m.a. við at menna Skotlandsrutuna, samstundis sum Hetland varðveitir sítt góða sjóvegis ferðasamband.

Stjórin vísir eisini á, at nýggja semjan stuðlar upp undir, at positiva fíggjarliga kósin, ið er løgd fyri fyritøkuna, kann haldast.

-árni



# Visjónin skal spískast

**Røðan vísir, hvat samgongan arbeiðir við. Og støðan í samfelagnum verður somuleiðis endurspegla. Vit síggja eina ávísa optimismu í samfelagnum, sum vísir, at mann hevur skapt ein ávísan stabilitet í samfelagnum. Men Visión 2015 skal spískast, soleiðis sigur formaður sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, í viðmerking til løgmansrøðuna 2006.**

LØGMANSRØÐAN
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*



Kaj Leo Johannessen hevur bæði positiv og meiri negativ orðingar viðvíkjandi røðuni. Hann fegnast yvir tey mál sum flokkurin hevur verið við til at føra ígjøgnum.

– Sambandið við Danmark er normaliserað aftur, vil eg siga. Har er eitt annað tónalag, enn tað sum var í undanfarnu samgongu. Vit arbeiða eisini við at fáa eitt betri samband við útheimin og at styrkja uttanríkissambond.

Ein nýggj pensjónsskipan skal gerast. Formaðurin ásannar, at hetta málið hevur líkasum ligið á láni og er á ein hátt dottið niður ímillum.

- Pensjónsskipanin skal í minsta lagi vera á hædd við hana í Danmark.

Á hinum bógvin heldur Kaj Leo tað vera óheppið við tí stóra hallinum á gjaldsjavnanum.

- Føroyingar læna meiri og meiri, har kann ein vandi liggja og lúra. Um nú rentustøðið hækkar nógv. So hetta er ikki nøktandi. Vit skulu hava javnvág á fíggjarlógina, hetta er ein av avbjóðingunum, sum liggur fyri framman.

Formaður Sambandsfloksins leggur í hesum sambandinum afturat, at viðvíkjandi øllum tosinum um Visjón 2015, so mugu vit ikki gloyma tíðina vit nú liva í. Eisini metir hann, at arbeiðið við visjónunum skal gerast meiri ítøkiligt.

- Samgongan hevur ikki verið nóg ítøkilig, vit mugu til at tilspíska visjónina. Visiónin skal til at spíssast til, vit mugu finna nøkur økir, sum vit velja út og leggja okkara orku á. Men afturat hesum so er avbjóðingin eisini at fáa andstøðuna við, tí í hesum arbeiðinum verða avgerðir tiknar, sum hava ávirkan langt fram í tíðina.

Viðvíkjandi yvirtøkuni av kirkjuni, so slær hann fast, at hóast talan er um yvirtøku, so rennur sambandsflokkurin ikki undan.

– So leingi talan er um eina skilagóða avgerð, í hesum førinum eina yvirtøku, so rennur flokkurin ikki undan. Vit halda okkum sjálvsagt til samgonguskjalið og arbeiða við at føra tað út í verki.

Kaj Leo Johannesen endar við einum positivum tóna og minnir á optimismuna, sum er í samfelagnum.

– Tað er gott at vera føroyingur í hesum døgum og, sum sagt, so er ein ávís optimisma at síggja.

# Semjusøkjandi røða

**– Eg eri nøgdur við røðuna og haldi ikki, at hon var so lítið ítøkilig, sum onkur hevur ført fram. Heldur hinvegin. Nú havi eg sjálvur sitið í somu støðu og haldi, at røðan í roynd og veru er rættiliga ítøkilig, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í Fólkaflokkinum**

LØGMANSRØÐAN
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Anfinn Kallsberg, formaður í Fólkaflokkinum, er væl nøgdur við røðuna. Í Útvarpi Føroya førdu formenninir í Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum fram, at teir saknaðu meiri ítøkiligt í framløgu løgmans ólavsøkudag. Anfinn Kallsberg, formaður í Fólkaflokkinum, er væl nøgdur við røðuna og metir atfinningarnar tæna egnum partapolitiskum endamálum.

– Røðan var sum hon plagar og sum hon eigur at vera. Hon var afturlítandi og eisini frameftirlítandi. Eg eri nøgdur við røðuna og haldi ikki, at hon var so lítið ítøkilig, sum onkur hevur ført fram. Heldur hinvegin. Nú havi eg sjálvur sitið í somu støðu og haldi, at røðan í roynd og veru er rættiliga ítøkilig. T.d. er tað trupult at vera so ítøkiligur, tá ið ein politisk viðgerð ikki hevur verið fyri enn. Og nógv av tí, sum løgmaður kemur inn á, eru stórmál, har breiðar semjur eru eitt krav. Harafturat umboðar løgmaður tað politisku skipanin og samgonguna. Røðan var semjusøkjandi og tað eigur hon eisini at vera.

Kallsberg nevnir íbúðarspurningin og fiskivinnupolitikkin, sum trupul mál, ið hava verið viðgjørd fyrr.

1. januar 2007 verða kirkjumál yvirtikin og løgd undir føroyskar myndugleikar at umsita. Og samþært framløgu løgmans verður miðjað eftir at á næstu ólavsøku verður kirkjan føroysk. Hetta er eisini størsta yvirtøkan í hesum valskeiðnum. Spurdur um yvirtøkuna av kirkjuni heldur Kallsberg hetta vera ein partur av einum longri arbeiði.

– "Mangir eru leikirnir í longum talvi", sigur orðatakið. Hetta er ein staðfesting av, at málið verður ført ígjøgnum. Samráðingar um hetta málið hava verið frammi fyrr, vit hava jú verið við frá byrjan av í 1998.

